# Starvssetanir innan fólkaskúlaøkið

TÍÐINDASKRIV

**Mentamálaráði skal við hesum boðað frá, at hesi leiðarastørv eru sett innan fólkaskúlaøkið:**

### Mentamálaráðið

Frá 1. juli 2002 er Emmy Joensen, Miðvágur, sett sum fulltrúi í Fólkaskúladeildini í Mentamálaráðnum.

Emmy Joensen er 43 ár, tók læraraprógv 1987. Hevur verið lærari í Miðvágs /Sandavágs skúla frá 1. august 1987, skúlastjóri við sama skúla frá 1. august 1992.

### Miðvágs- Sandavágs skúli

Frá 1. august 2002 er Hans Jørgensen, Miðvágur, settur sum skúlastjóri í Miðvágs/Sandavágs skúla.

Hans Jørgensen er 57 ár, tók læraraprógv 1972. Hevur verið lærari í Miðvágs-Sandavágs skúla frá 1. august 1972.

### Vestmanna skúli

Frá 1. august 2002 er Símin Simonsen, Vestmanna, settur sum skúlastjóri í Vestmanna skúla.

Símin Simonsen er 52 ár, tók læraraprógv 1975. Hevur verið lærari í Vestmanna skúla frá 1. august 1975.

### Tvøroyrar skúli

Frá 1. august 2002 er Finn J. Thomsen, Tvøroyri, settur sum deildarleiðari í Trongisvágs skúla.

Finn Thomsen er 46 ár, tók læraraprógv 1982. Hevur verið lærari í Tvøroyrar skúla frá 1. august 1982.

### Eysturskúlin

Frá 1. august 2002 er Jógvan Martin Mørk, Tórshavn, settur sum 2. varaskúlastjóri í Eysturskúlanum.

Jógvan Martin Mørk er 51 ár, tók læraraprógv 1980. Hevur verið lærari í Eysturskúlanum frá 1. august 1980.



Emmy Joensen



Hans Jørgensen



Símun Simonsen



Finn J. Thomsen



Jógvan Martin Mørk



Johannes Eli Iversen



Arnfinnur Bjarkhamar



Símun av Skarði

### Tórshavnar Kommunuskúli

Frá 1. august 2002 er Johannes Eli Iversen, Tórshavn, settur sum 2. varaskúlastjóri í Tórshavnar Kommunuskúla.

Johannes Eli Iversen er 54 ár, tók læraraprógv 1972. Hevur verið lærari í Tórshavnar Kommunuskúla frá 1. august 1972.

### Sumbiar skúli

Frá 1. august 2002 er Arnfinnur Bjarkhamar, Vágur, settur sum fyrstilærari í Sumbiar skúla.

Arnfinnur Bjarkhamar er 51 ár, tók læraraprógv 1995. Var lærari á Leiti til 1. august 2001, tá hann var fyribilssettur fyrstilærari í Sumba.

### Skopunar skúli

Frá 1. august 2002 er Símun av Skarði, Sandi, settur sum fyrstilærari í Skopunar skúla.

Símun av Skarði er 57 ár, tók læraraprógv 1970. Hevur verið lærari í Sandoyar Meginskúla frá 1. august 1979.

# Í Íslandi at kunna seg um undirsjóvartunnil

**Borgarstjórin í Klaksvík var í farnu viku í Íslandi fyri at kanna, hvussu Akranes hevur fótað sær, eftir undirsjóvartunnilin varð gjørdur undir Hvalfjørð**

FAST SAMBAND

*Eyðun Klakstein*

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, vitjaði í farnu viku í Íslandi, har ørindini vóru at kanna, hvussu Akranes hevur staðið seg, síðani fast samband kom um Hvalfjørð, og teinurin til Reykjavíkar minkaði munandi.

– Umstøðurnar hjá okkum og teimum á Akranesi eru sera líkar. Har búgva á leið tað saman av fólki sum í Klaksvík, tey dúva á fiskivinnu, tey hava sjúkrahús og gera nógv við ítróttin. Tí er tað áhugavert at vita, hvussu tey hava fyrireikað seg til fasta sambandið, og hvussu tað hevur gingist hesi trý árini, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Borgarstjórin í Klaksvík heldur seg hava fingið nógv burtur úr ferðini, og hann hevur gott mót til undirsjóvartunnilin um Lor-víksfjørð, sum væntandi kemur um fá ár.

– Eg fekk nógv burtur úr, sum vit kunnu brúka í okkara fyrireikingararbeiði til undirsjóvartunnilin. Á Akranesi høvdu teir ein arbeiðsbólk, sum tvey ár áðrenn undirsjóvartunnilin kom, fóru í holt við eitt miðvíst arbeiði í býnum, sigur Steinbjørn Jacobsen.

### Seta arbeiðsbólk

Í Klaksvík ætla tey at gera á líknandi hátt við arbeiðsbólki og breiðum samstarvi í býnum.

– Vit hava havt hetta málið til viðgerðar í meirilutan, og vit eru samd um, at tað ræður um at fáa eitt so gott og breitt samstarv sum tilber. Vit ætla at fara meira miðvíst til verka í næstum, so Klaksvík kann verða væl fyrireikað til fasta sambandið, sigur hann.

Á Akranesi lata tey væl at, nú trý ár eru síðani fasta sambandið kom um Hvalfjørð, og tað nú bert eru trý korter at koyra til høvðsstaðin, har eini tveir triðingar av fólkinum býr.

– Fólk støðan betur á Akranesi, nú fasta sambandið er komið, tað er sera nógv ferðsla um Hvalfjørð, og ferðslan bara veksur. Íslendska stjórnin hevur seinastu árini lagt landsstovnar út um landið, og tað hevur Akranesi eisini fingið ágóðan av, síðani fasta sambandið kom, sigur Steinbjørn Jacobsen.



*– Eg fekk nógv burtur úr vitjanini á Akranesi, sum vit kunnu brúka í okkara fyrireikingararbeiði til undirsjóvartunnilin, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, sum hitti borgarstjóran á Akranesi, Gísla Gíslason*

Ferðin til Ísland kom í lag, tá borgarstjórin á Akranesi, Gísli Gíslason, vitjaði í Klaksvík í fjør. Gísli var formaður í arbeiðsbólkinum, sum fyrireikaði Akranes til fasta sambandi, og hann var vertur fyri vitjanini hjá Steibjørn á Akranesi.

Umframt borgarstjóran vóru eisini tveir embætismenn hjá Klaksvíkar kommunu við á ferðini í Íslandi, har teir eisini vitjaðu í Kópavogi og á Akureyri.

## Tøkk

Eg vil við hesum hjartaliga takka øllum tykkum, ið gleddu meg á 90 ára føðingardegi mínum, sum varð hildin tann 15. juni í Bygdarhúsinum í Kollafirði.

Tøkk fyri gávur, heilsanir, telegramm, brøv og uppringingar. Mest gleddi meg tó at síggja andlit tykkara.

Ein serstøk tøkk til kokkar og øll tykkum, sum vóru við til at hjálpa og gera dagin so hugnaligan.

*Kærastu heilsanir*
**Ebbedinna**



Óli Breckman:

# Virðisbrævamarknaður er eingin treyt

**Fólkaflokkurin er fleksibul og vil ikki lata eina orðing í samgonguskjalinum leggja fót fyri einum fríari vinnulívi, sigur Óli Breckman, formaður í tingbólki Fólkafloksins. Tí fer flokkurin ikki at seta seg ímóti, um Framtaksgrunnurin fer undir at privatisera Fiskavirking, áðrenn ein virðisbrævamarknaður er settur á stovn.**

EINSKILJING

*Rúnar Reistrup*



*Óli Breckman heldur ikki, at orðingarnar í samgonguskjalinum eiga at vera so bindandi, at tær avmarka frælsi hjá vinnulívinum.*

Óli Breckman, formaður í tingbólki Fólkafloksins, sigur Fólkaflokkin vera til reiðar at lata Framtaksgrunnin fara undir at einskilja Føroya Fiskavirking uttan mun til, um ein virðisbrævamarknaður frammanundan er settur á stovn ella ikki.

Útvarp Føroya endurgav mánadagin formanninin fyri nevndina í Framtaksgrunninum, Niels Winther Poulsen, fyri at siga, at Framtaksgrunnurin ikki kundi binda seg til at bíða eftir einum virðisbrævamarknað, áðrenn farið verður undir at einskilja Fiskavirking.

- Fólkaflokkurin vil hava ein virðisbrævamarknað settan á stovn skjótast gjørligt, og nú Framtaksgrunnurin er farin undir fyrireikingar at einskilja Fiskavirking, eiga vit at kýta okkum at fáa virðisbrævamarknaðin kláran longu í heyst. Men ber tað ikki til at fáa virðisbrævamarknaðin á stovn so skjótt, verður tað ikki Fólkaflokkurin, sum fer at steðga Framtaksgrunninum í at fremja eina privatisering, sigur Óli Breckman.

### Samgonguskjalið kann dagførast

Í samgonguskjalinum hava samgonguflokkarnir fest á blað eina avtalu um, at »tá virðisbrævamarknaður er settur á stovn, verður farið undir varliga og gjøgnumskygda einskiljing av vinnuligu fyritøkum landsins«.

Men hesa avtalu sær Óli Breckman ikki sum nakran endaligan sannleika.

- Avtalurnar í einum samgonguskjali mugu kunna dagførast, um so er, at fortreytirnar fyri avtaluni broytast. Vit kunnu nú einaferð ikki stýra Framtaksgrunninum, og um Framtaksgrunnurin fer undir at einskilja Fiskavirking, áðrenn vit hava fingið ein virðisbrævamarknað á stovn, so eru umstøðurnar broyttar, og tá eigur man at vera fleksibul, heldur Óli Breckman.

### Leggur ikki í Tórbjørn

Tórbjørn Jacobsen sigur í grein aðrastaðni í blaðnum í dag, at hann ikki kann góðtaka, at ein einskiljing av Fiskavriking verður framd uttan ein virðisbrævamarknað, men hetta tekur Óli Breckman sær ikki av.

- Eg leggi ikki í hvat Tórbjørn Jacobsen hevur at siga. Tórbjørn Jacobsen hevur sjálvur biðið um ikki at vera partur av samgonguni longur, og Tjóðveldisflokkurin hevur meldað út, at tað, sum Tórbjørn sigur, ikki hevur nakað við flokkin at gera, sigur Óli Breckman.




Tú ert millum 13 og 25 ár. Alt annað er líkamikið. Dámar tær 1nú romantiskar tónar, tá ið tit eru 2eini? Ert tú tann seigi, sum einsamallur 3vur í Ormin Langa, ella hin bragdliga, sum altíð skalt 4 nakrar flatar? Setur tú hvørt 5oyra inn á kontu ella keypir tú heldur 6tanda parið av diesel-buksum? Nýforelskaður og í 7. himni, ella bert tú als ikki 8 fyri at vera single? Eisini líkamikið! Fá tær bara eitt av spildur9 +kortunum frá Føroya Sparikassa. Tú kanst velja millum 10! Við egnum nick-navni, sjálvandi ;)

Bílegg títt +kort í Føroya Sparikassa. Eisini um tú hevur eitt frammanundan. Hav eina passmynd av tær sjálvum við. Tú fært nýggju stakfløguna hjá Brandi Enni beinanvegin – ókeypis!

**Atgongumerki til konsertirnar hjá Brandi Enni, 28. juli, fáast í Føroya Sparikassa.**

**Plusspakkin:** Í plusspakkanum eru tvær kontur og eitt +kort. Fyrra kontan, +Spar, er bundna sparikontan. Seinna kontan er +Kontan. Hon er brúkskonta við tínum serstaka +korti.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo